# Gásadalur lagdur undir asfalt

**Bygdarvegirnir í Gásadali verða nú asfalteraðir. Tað er fyrstu ferð nakrantíð, asfalt hevur verið í Dalinum**

KOMMUNALTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Gásadali:**
Nýggja tíðin er komin til Gásadals. Vegirnir í bygdini verða nú lagdir undir asfalt. Arbeiði skal gerast í hesum árinum.

Teir asfaltera í Gásadali. Fyri fyrstu ferð. Allir vegirnir inni í bygdini verða lagdir undir asfalt. Eisini vegurin frá ánni niðan til sjálva bygdina. Hetta eru teir kommunalu vegirnir í Gásadali.



*Stórar asfaltmaskinur hava seinastu dagarnar verið at sæð millum húsini í Gásadali, har asfalt er lagt á kommunalu vegirnar*

*Mynd: Edvard Joensen*

Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Sóknar Kommunu, sum Gásadalur er partur av, sigur, at tað, sum nú verður gjørt, lutvíst er fyri kommunalar pengar, hjá Bíggjar Sóknar Komunu, og lutvíst fyri pengar, sum landsstýrið hevur latið kommununi sum útoyggjastuðul. Gásadalur hevur verið bólkaður sman við útoyggjunum, áðrenn tunnilin varð skotin ígjøgnum.

Á nýggjárinum verður Gásadalur saman við Bø partur av Sørvágs Kommunu, og tá verður bygdin ikki roknað sum útoyggj meira.

Jógvan Páll Joensen sigur, at kommunan hevur fingið eina millión krónur burtur av útoyggjastuðlinum, sum latin verður til at útbyggja undirløgukervið (infrastrukturin) í útoyggjarøkinum.

Í Gásadali veðra allir kommunalu vegirnir, sum tó ikki eru so øgiliga nógvir, gjørdir av nýggjum frá grundini av. Alt er grivið upp, og rør og aðrar leiðingar lagdar av nýggjum, áðrenn asfalterað er oman yvir aftur.

– Tað, sum sæst, er gjørt fyri útoyggjastuðulin, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Sóknar Kommunu. Tað er asfaltið. Restina hevur kommunan goldið, sigur hann.

Samlaða verkætlanin í Gásadali hesaferð hevur verið vegagerðin, eitt parkeringspláss og ein lítil útstykking, sum byrjað eisini er uppá, sigur borgarstjórin.

Arbeiðið varð boðið út, og tað er eitt samtak av arbeiðstakarum í Vágum, sum hevur gjørt arbeiðið í Gásadali.



*Gásadalur er komin inn í nýggju tíðina. Á nýggjárinum verður bygdin ikki meira roknað sum útoyggjarøki, men partur av Sørvágs Kommunu*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Gera tunnilsinntak í Gásadali

**Teir eru farnir undir at gera tunnilsinntakið, portalin, til Gásadalstunnilin Gásadalsmegin. Arbeiðið skal ætlandi vera liðugt í ár**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*

**Gásadali:**
Teir arbeiða við tunnilsinntakinum til Gásadalstunilin Gásadalsmegin. Arbeiðið skal verða liðugt í hesum árinum.

Tað eru ikki nógvir pengar eftir at arbeiða fyri hjá Landsverki. Men so mikið er kortini, at arbeitt verður av allari makt við at fáa tunnilsinntakið í Gásadali liðugt. Inntakið í Áardali Bíggjarmegin má bíða. Tað eru ikki pengar til tað í ár.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Oyvindi Brimnes, stjóra á Landsverki, áðrenn blaðið fór til prentingar. Men við Sosialin fyrr í heyst segði hann, at arbeiðið upp á tunnilsinntakið i Gásadali fór at verða boðið út í ár. Og tað skuldi so ætlandi gerast líðugt áðrenn nýggjár. Meira rakk játtanin ikki til, segði stjórin á Landsverki tá.

Seinastu dagarnar hava menn arbeitt við at gera klárt at stoypa upp fyri tunnilsmunnan Gásadalsmegin. Og gongur, sum stjórin á Landsverki fyrr hevur ætlað, verður arbeiðið gjørt liðugt í hesum árinum.



*Teir arbeiða við at gera tunnilsinntakið Gásadalsmegin liðugt. Pengar eru settir av at gera arbeiðið í ár*

*Mynd:Edvard Joensen*


merko JÓLAKALENDARIN

Týsdagur 21. desember 2004

ÍSLENDSKT LAMBSKJÓGV fyri kg.



54,95

KLEMENTINIR 1 kg.



13,95

SODAVATN Føroya Bjór 1,5 ltr.



10,95 + pant



SPURNINGUR

Hvør hevur yrkt tjóðsang okkara "Tú alfagra land mítt" ?

Tilboðið er bert galdandi týsdagin 21. desember 2004

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum



SVAR

NAVN & TELEFON NUMMAR